TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Kristina Roest og Annika Pearce, ið møtir fyri Boga Johannesen.
Skrivari: Jónleyg J. Bech

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Samanbering av skattatølum 2018 | 2 |
| 2 | Tilmæli frá mentanarnevndini í.s.v. umsókn frá TB fótbóltur um fíggjarligan stuðul | 2 |
| 3 | Útbygging av barnagarðinum Mýrifípan - úrslitið av lisitatiónini fyri timbur og snikkaraarbeiði | 3 |
| 4 | Uppskot um keyp av hølunum hjá Posta á Tvøroyri | 4 |
| 5 | Uppskot um broyting í starvsfólkaskipanini viðv. at hækka fráfaringaraldurin til 70 ár | 5 |
| 6 | Vitjan av Tatiana Valovaya, handilskommiserur hjá Evroasiatisku búskaparsamgonguni á Tvøroyri leygardagin 25. august | 7 |
| 7 | Vitjan av Føroyanevnd Fólkatingsins í september 2018 | 7 |
| 8 | Umsókn um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi til SALT til ummælis | 8 |




Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**25.20.00-I00-1-18**

## 1. Samanbering av skattatølum 2018

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 1:**
Borgarstjórin kunnar nevndina um skattainntøkurnar fyri juli og fyri árið sum heild. Hann metir, at inntøkurnar av partafelagsskatti verða væl lægri í 2018, enn tær vóru í 2017.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um skattainntøkurnar fyri juli og fyri árið sum heild.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2017-2018.xlsx
- Skattur 2018.xlsx

**20.00.00-I00-2-18**

## 2. Tilmæli frá mentanarnevndini í.s.v. umsókn frá TB fótbóltur um fíggjarligan stuðul

### Málsfrágreiðing

TB fótbóltur v/Henrik Thomsen, formanni, søkja um fíggjarligan stuðul í sambandi við kappingarárið 2018, íalt kr. 300.000,- líkasum undanfarin ár.

Mentanarnevndini viðgjørdi umsóknina frá TB á fundi tann 20. juni í ár, og gjørdi nevndin í hesum sambandi eitt tilmæli í málinum til støðutakan hjá býráðnum.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Mentanarnevndin, 20. juni 2018, pkt. 4:**
Mentanarnevndin samtykti, at mæla býráðnum til, at játta TB fótbóltur kr. 300.000,- líkasum undanfarin ár við tí treyt, at kr. 75.000,- av játtaða stuðlinum verður oyramerktir til menning av ungdómsfótbóltinum í TB.

**Avgerð**

Einmælt samtykt at bjóða nevndini í TB á fund við býráðið áðrenn aðalfundin hjá TB.
Einmælt samtykt eisini at bjóða umboðum fyri stuðulsbólkin hjá TB á fund við býráðið.

**Skjøl**

- Umsókn um stuðul frá TB fótbóltur kappingarárið 2018
- Teldupostur frá Henrik Thomsen
- Roknskapur hja TB pr. 27.07.2018
- Roknskapur pr. 27.07.2018 fyri samstarvið TB/FCS/Royn
- Dagsordenspunkt: Umsókn um fíggjarligan stuðul frá TB fótbóltur behandlet på mødet 15. august 2018 kl. 08:30 (Býráðsskrivstovan) i Fíggjarnevndin (2018).docx

**27.00.00-6-14**

## 3. Útbygging av barnagarðinum Mýrifípan - úrslitið av lisitatiónini fyri timbur og snikkaraarbeiði

**Málsfrágreiðing**

**Sosiala nevnd, 14. august 2018, pkt. 2:**
Nevndin mælir einmælt til at fylgja tilmælunum hjá bygginevndini um at taka av tilboðnum frá MTV Byggivirki og tilmælinum um at fáa plantað botnplantir í skráanum aftanfyri bygningin og planta økið sum heild, sum ein liður í verkætlanini. Mælt verður eisini til at biðja um ráðgeving frá Gróðurstøðini viðv. plantum.

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 8:**
Nevndin mælir einmælt til at fylgja tilmælunum hjá bygginevndini um at taka av tilboðnum frá MTV Byggivirki.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Einmælt samtykt at taka av tilboðum frá MTV Byggivirki áljóðandi kr. 6.449.464,00, og at geva borgarstjóranum og kommunustjóranum heimild at undirskriva sáttmálan við felagið.

### Skjøl

- NÝ- OG UMBYGGING AV BARNAGARÐI Í TRONGISVÁGI
- Fundarfrásøgn

**82.01.00-P20-1-17**

## 4. Uppskot um keyp av hølunum hjá Posta á Tvøroyri

### Málsfrágreiðing

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 10:**
Borgarstjórin mælir frá at keypa bygningin, tí landsstýriskvinnan arbeiðir við at yvirtaka alt kommunulæknaøkið. Hann metir, at inntøkurnar hjá kommununi verða nógv minni í 2018 enn í 2017. Eisini vísir hann á, at kommunulæknarnir hava greitt frá, at tað er høli til ein lækna undir útbúgving, ið manglar í verandi bygningum bæði í Vági og á Tvøroyri, og metingin hjá tekniska leiðaranum er, at hølini í posthúsbygninginum eru egnaði til tveir læknar.

Ragnar Guttesen, tekniskur leiðari, kemur á fundin kl. 10.13. kommunustjórin greiðir frá, at í fundarfrágreiðingini, hann hevur skrivað, stendur, at hølini eru egnaði til tveir læknar. Spurdur, metir hann at tað eisini kann brúkast til tríggir. Hann sigur, hann skal kanna hetta. Ragnar Guttesen fer av fundinum aftur. Nevndin ynskir, at miðjað verður ímóti, at tekniski leiðarin ger eitt uppskot og eina kostnaðarmeting av innrætting av hølunum til kommunulæknavirksemi til tríggjar læknar til komandi býráðsfund.

Bjarni Hammer mælir til, at umsitingin tosar við stjóran í Posta um, hvør kostnaðurin er fyri bygningin og møguligar leiguinntøkur í samband við, at Posta leigar niðaru hæddina.

Til hetta viðmerkir borgarstjórin, at umsitingin fyrst og fremst er borgarstjórin, og meirilutin hevur samtykt, at borgarstjórin ikki skal á fund við stjóran í Posta um málið.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Kristina Roest viðmerkir, at hon heldur, at borgarstjórin skal fara at lesa samtyktina hesum viðv. umaftur.

Nevndin tekur undir við tilmælinum frá sosialu nevnd hin 14. august um, at fíggjarnevndin kannar fíggingarmøguleikar til keyp av bygninginum hjá Posta, helst uttan lántøku.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um, at tilfarið frá teknisku deild ikki er klárt enn. Einmælt samtykt at bíða eftir hesum.

### Skjøl

- Virðismeting av Posthúsb. á Tvøroyri - 30.05.2017.doc.pdf
- Fundarfrásøgn - møguligt keyp av Postabygninginum á Tvøroyri
- Tilmæli frá fíggjarleiðaranum viðv. posthúsbygninginum
- Langtíðarætlan
- Yvirlit løgur 2018

**81.00.00-A00-3-18**

## 5. Uppskot um broyting í starvsfólkaskipanini viðv. at hækka fráfaringaraldurin til 70 ár

### Samandráttur

Borgarstjórin hevur skotið upp at broyta §8 í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar Kommunu, ið er soljóðandi:

**8. Fráfaringaraldur**
Fráfaringaraldurin fyri starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu er 67 ár. Undantøk kunnu vera gjørd í serligum førum.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 12-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

## Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 13. august 2018, pkt. 13:**
Nevndin mælir til at broyta starvsfólkaskipanina soleiðis, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár.

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 12:**
Borgarstjórin mælir til at hækka fráfaringaraldurin til 70 eins og landið og fleiri kommunur hava gjørt, tó so, at um starvsfólk ynskir at fara frá við 67 ára aldur, kunnu tey tað.

Kristina Roest og Bjarni Hammer mæla til, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár. Mannagongdir verða gjørdar um, hvussu hetta skal praktiserast.

## Avgerð

1. viðgerð av broyting í starvsfólkaskipanini hjá Tvøroyrar Kommunu:

Einmælt samtykt broyta starvsfólkaskipanina soleiðis, at fráfaringaraldurin framvegis er 67 ár, men øll starvsfólk skulu hava møguleika at søkja um at vera í starvi til tey eru 70 ár. Umsitingin skal kunna starvsfólk um hetta í góðari tíð áðrenn tey verða 67 ár.

Einmælt samtykt at broyta yvirskriftina í greinini tá fólk fara frá fyri aldur til "Tá starvsfólk fara úr starvi".

## Skjøl

- Rundskriv um fráfaringaraldur 70 ár FMR
- Teldupostur frá Klaksvíkar Kommunu
- Teldupostur frá Runavíkar Kommunu
- Teldupostur frá Fuglafjarðar Kommunu
- Teldupostur frá KAF
- Teldupostur frá Eystur Kommunu

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 12-2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.05.11-P00-1-18**

## 6. Vitjan av Tatiana Valovaya, handilskommiserur hjá Evroasiatisku búskaparsamgonguni á Tvøroyri leygardagin 25. august

### Málsfrágreiðing

Tatiana Vaovaya, handilskommiserur hjá Evroasiatisku búskaparsamgonguni er í døgunum 23. -26. august á almennari vitjan í Føroyum, sum Poul Michelsen, landsstýrismaður er vertur fyri. Í hesum sambandi er ætlanin at vitja á Tvøroyri og har um leiðir leygardagin 25. august millum kl. 10.00 – 17.00.

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 4:**
Einmælt samtykt, at býráðið luttekur í tí partinum, ið kommunan er vertur fyri.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar býráðið um at Tatiana Vaovaya, handilskommiserur hjá Evroasiatisku búskaparsamgonguni vitjar á Tvøroyri leygardagin 25. august, og at Tvøroyrar Kommuna verður vertur fyri einum døgurða í SALT.

### Skjøl

- Teldupostur frá UVMR

**00.05.11-G01-1-18**

## 7. Vitjan av Føroyanevnd Fólkatingsins í september 2018

### Málsfrágreiðing

**Mentanarnevndin, 13. august 2018, pkt. 3:**
Mælt verður til at bjóða gestunum eina máltíð í SALT, døgurða og kaffi omaná. Skotið verður upp at hava føroyskt lambakjøt, evt. grillað, við tilhoyri og onkra dessert við rabarbum omaná. Fyrisitingin spyr um prís hjá ymsum veitarum av mati.



Formansváttan

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Mælt verður eisini til at skipa fyri einum tónleikainnslagi.
Nevnt verður fyri John Johannesen, at Smyril siglir norður kl. 18.30.

**Fíggjarnevndin, 15. august 2018, pkt. 5:**
Einmælt samtykt, at býráðið luttekur í tí partinum, ið kommunan er vertur fyri.

### Avgerð

Borgarstjórin kunnar um, at Føroyanevndin hjá Fólkatinginum vitjar á Tvøroyri 10. september, og at Tvøroyrar Kommuna í tí sambandi er vertur fyri einum døgurða í SALT.

### Skjøl

- Teldupostur frá john Johannesen

**22.01.01-G01-1-18**

## 8. Umsókn um matstovuloyvi, skeinkiloyvi og alment loyvi til SALT til ummælis

### Avgerð

Einmælt samtykt at beina málið í mentanarnevndina.

### Skjøl

- VS: Umsókn frá SALT
- Tekningar
- Umsókn

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 12-2018 |
| Fundardagur | 20. august 2018 kl. 17:00 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin**

**Fundur lokin**

Kristin Michelsen: ____________________

Bjarni Hammer: ____________________

Anita Vibergsdóttir: ____________________

Alvi Mortensen: ____________________

Kristina Roest: ____________________

Súsanna Bertholdsen: ____________________

Annika Pearce: ____________________



Formansváttan